# Stutt og greitt um ekortið

**Hetta eblaðið er tað fyrsta í eini røð av afturvendandi ebløðum, sum fara at vísa á tey mongu góðu tilboðini og evinningin, ið eru og fara at koma frá luttakandi handlum og fyritøkum.Sosialurin stendur fyri øllum ebløðunum.**
**Les meira á heimasíðuni www.ekort.fo**

**Hvat er eitt ekort?**
ekortið er eitt MasterCard, t.e. eitt kredittkort, sum kann brúkast um allan heimin. Tað serliga við ekortinum er, at tú fært 0,5% í avsláttri hvørja ferð, tú brúkar kortið. Haraftrat fært tú evinning og eyka avsláttur í øllum handlum og á sølustøðum, sum hava ekort frámerkið. Haraftrat fylgir ferðatrygging við kortinum.

**Hvat er evinningur og nær fái eg hann?**
evinningur er tann avsláttur, sum tú fært hvørja ferð, tú brúkar kortið. Avsláttur, tvs. evinningurin, verður samlaður á eini serligari kontu, og verður útgoldin tær hvørt ár í desember.

**Hvør er aftan fyri ekortið?**
Eik Banki er kortútgevari, men øll kunnu søkja um at fáa ekort. Tað er ikki neyðugt at vera kundi í Eik fyri at fáa kortið.

**Hvussu fái eg kortið?**
Tú kanst fylla út umsóknarblað í ekorthandlunum ella taka niður umsóknarblað á heimasíðuni. Minst til, at um tú ert heilkundi í Eik er ikki neyðugt at leggja skattapappír við umsóknini.

**Hvar kann eg brúka tað?**
Tú kanst brúka ekortið stórt sæð alla staðni í Føroyum. Handilin ella sølustaðið skal hava eina altjóða avtalu, tvs. skal kunna taka ímóti Visa Electron og MasterCard. Enn eru tó nakrir fáir handlar, sum ikki hava hesa avtalu.

**Kunnu øll fáa ekort?**
Øll, sum eru 18 ár, kunnu søkja um at fáa ekort. Eik 'kredittmetir' síðan allar umsøkjararar.

**Hvat er ein kredittmeting?**
Av tí at kortið er eitt kredittkort, er neyðugt at gera eina meting í hvørjum einstøkum føri, um umsøkjarin er egnaður at hava kreditt. Tey allarflestu, sum longu hava visa kort, kunnu eisini fáa ekort.

**Er tað lætt at fáa sær ekort?**
Ja, tú skal bara útfylla umsóknarblaðið og leggja tað í postkassan ella lata tað inn í ein ekorthandil. Eik rindar postgjaldið.

**Kann eg brúka kortið uttanlands?**
Ja, ekortið er eisini eitt vanligt MasterCard, sum kann brúkast í øllum heiminum.

**Hvussu langa tíð tekur tað at fáa kortið?**
Vanliga ganga uml. 10 – 14 dagar, frá at umsóknin er móttikin, til tú hevur kortið. Í einstøkum førum kann tað taka longri tíð.

**Hvat kostar tað at hava ekort?**
Eitt standard ekort við ferðatrygging kostar 400,- kr. um árið og eitt standard ekort uttan trygging kostar 200,- kr. um árið. Eitt gull ekort kostar 900,- kr. árliga.










ekortið – eitt kredittkort við kontantum fyrimunum!